Heilsumálaráðið

Dagfesting:	2. august 2022
Mál nr.:	22/13786-36
Málsviðgjørt:	KG/RM
Ummælistíð:	Er ikki sent til ummælis
Eftirkannað:	19. juli 2022

Uppskot til

Løgtingslóg
um
heimild at taka ímóti peningaupphædd frá Novo Nordisk Fonden

§ 1. Landsstýrismanninum verður heimilað at taka ímóti 121 mió. kr. frá Novo Nordisk Fonden. Upphæddin verður brúkt í tíðarskeiðinum 1. januar 2023 til 31. desember 2032 til at fíggja rakstur og løgur í samstarvinum partanna millum um átøk innan viðgerð, tvørgeiraligt samstarv og gransking innan diabetes og endokrinologiskar sjúkur annars. Upphæddin verður útgoldin árliga, sambært avtalu millum landsstýrið og Novo Nordisk Fonden.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Í 2018 vendi Novo Nordisk Fonden sær til Heilsumálaráðið við einum fyrispurningi, um áhugi var fyri at fara undir eitt samstarv um átøk innan diabetesviðgerð í Føroyum. Eftir fund millum landsstýrismannin og Novo Nordisk Fonden í oktober 2019 fóru partarnir undir arbeiðið at orða innihaldið í samstarvinum teirra millum. Partarnir samdust um at víðka samstarvið frá bert at fevna um diabetes til eisini at fevna um aðrar endokrinologiskar[1] sjúkur.

Arbeiðið at orða innihaldið í samstarvinum millum landsstýrið[2] og Novo Nordisk Fonden er skipað í tveimum pørtum:

1. Yvirskipað ætlan, nevnd Visiónsætlan, og síðani
2. Ítøkilig ætlan, nevnd Virkisætlan

Í yvirskipaðu ætlanini er lýst, hvørji øki samstarvið millum landsstýrið og Novo Nordisk Fonden skal fevna um. Semja er um at samstarva um átøk innan viðgerð, tvørgeiraligt samstarv og gransking. Hetta arbeiðið er gjørt í tøttum samstarvi við viðkomandi partar. Í mai 2021 góðkendu landsstýrismaðurin í heilsumálum og nevndin í Novo Nordisk Fonden yvirskipaðu ætlanina fyri samstarvinum innan hesi øki. Ætlanin nevnist Vision for styrket diabetes og anden endokrinologisk indsats på Færøerne. Etablering af Steno Diabetes Center på Færøerne.

Við støði í yvirskipaðu ætlanini fóru Heilsumálaráðið og Novo Nordisk Fonden undir arbeiðið at orða eina meira ítøkiliga ætlan fyri innihaldið í samstarvinum. Hetta arbeiðið varð gjørt í tøttum samstarvi við viðkomandi partar á økinum. Átta arbeiðsbólkar vórðu settir, sum hava viðgjørt og eru komnir við uppskotum innan hvør sítt øki í samstarvinum. Arbeiðsbólkarnir vóru mannaðir við viðkomandi heilsustarvsfólkum, Diabetesfelagnum, granskarum o.ø. Harumframt hevur fundur verið við persónar, ið hava diabetes.

Við støði í arbeiðinum hjá arbeiðsbólkunum, hava Heilsumálaráðið og Novo Nordisk Fonden orðað eina Virkisætlan fyri samstarvið, nevnd "En styrket diabetes og anden endokrinologisk indsats på Færøerne. Etablering af Steno Diabetes Center Færøerne – Steno Miðstøðin". Upphæddin, sum er ásett í lógaruppskotinum, skal brúkast til at fíggja samstarvið um átøk innan diabetes- og endokrinologiska økið samsvarandi Virkisætlanini.

Samstarvið millumlLandstýrið og Novo Nordisk Fonden fær føroyska heitið Steno Miðstøðin og danska heitið Steno Diabetes Center Færøerne.

1.2. Galdandi lóggáva

Ongin lóggáva er á økinum. Talan er um týðandi peningaupphædd, sum verður ásett í fíggjarlóg árini 2023-2032, og tí er mett, at tað er neyðugt at fáa heimild at taka ímóti peningaupphæddini.

[1] Endokrinologi er læran um hormon og hormonelt treytaðar sjúkur.
[2] Heilsumálaráðið hevur staðið fyri arbeiðinum vegna landsstýrið.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at heimila, at landsstýrismaðurin kann taka ímóti 121 mió. kr. frá Novo Nordisk Fonden. Upphæddin verður útgoldin sambært avtalu millum landsstýrið og Novo Nordisk Fonden, og skal brúkast til at fíggja tey samstarvsøki, sum eru nevnd í Virkisætlanini partanna millum. Virkisøkini eru: Viðgerð, tvørgeiraligt samstarv, gransking/granskingarundirstøðukervi og hølisviðurskifti. Harafturat verður partur av upphæddini brúktur til starvsfólkaútreiðslur, sum fara at standast av samstarvinum.

Umframt peningaupphæddina í lógaruppskotinum á 121 mió. kr., hevur landið longu fingið 2 mió. kr., sum vóru ætlaðar at fíggja løn til avloysarar, um tørvur var á at útvega eyka starvsfólkaorku, meðan starvsfólk í Sjúkrahúsverkinum arbeiddu við Virkisætlanini. Hetta merkir, at tann samlaða upphæddin, sum Novo Nordisk Fonden letur Føroyum, er 123 mió. kr.

Samstarvið millum landsstýrið og Novo Nordisk Fonden er galdandi í 10 ár, og fevnir um tíðarskeiðið 1. januar 2023 – 31. desember 2032. Upphæddin á 121 mió. kr. skal nýtast til at fíggja samstarvið í hesum tíðarskeiði, t.v.s. til rakstur og løgur.

Samlaða 10 ára tíðarskeiðið verður býtt í trý styttri tíðarskeið, og verður ein avtala gjørd fyri hvørt tíðarskeið. Tann fyrsta og næsta avtalan fevna um fýra ár í senn, meðan tann triðja fevnir um tvey tey síðstu árini í samstarvinum. Virkisætlanin, sum nú er gjørd, er serliga ítøkilig fyri tey fyrstu fýra árini av samstarvinum partanna millum.

Tá tey fyrstu 10 árini eru lokin, ber til at gera nýggjar avtalur, sum verða gjørdar fyri fýra ár í senn. Hvørja ferð ein nýggj avtala verður gjørd, verður avtalað, hvør upphædd verður latin at fíggja innihaldið í samstarvinum. Koma partarnir ikki ásamt um, hvussu samstarvið skal halda fram, ella ynskir annar parturin at enda samstarvið, verður farið undir eina tilgongd at enda tað.

Heilsumálaráðið og Novo Nordisk Fonden hava ta áskoðan, at samstarvið fer at styrkja bæði viðgerðarpartin og heilsugranskingarpartin. Tá tað snýr seg um viðgerð, verður talan bæði um at styrkja verandi viðgerðartilboð og menna nýggj viðgerðartilboð til persónar við diabetes og endokrinologiskum sjúkum annars. Í Virkisætlanini eru nevnd ein rød av viðgerðartilboðum og førleikamenning, sum ætlanin er at fara undir sum liður í samstarvinum. Talan er um viðgerðartilboð og at førleikamenna heilsustarvsfólk innan sjúkrahúsverkið og í primera heilsugeiranum, t.d. í kommunulæknaskipanini. Førleikamenning fer eisini at verða veitt øðrum heilsustarvsfólkum, t.d. heilsufrøðingum og kostfrøðingum.

Í Virkisætlanini verður dentur lagdur á at styrkja heilsugransking og granskingarundirstøðukervið. Tá Steno Miðstøðin er sett á stovn, verður farið undir at orða eina granskingarætlan, har dentur verður lagdur á at menna og styrkja gransking, ið hevur samband við diabetes og aðrar endokrinologiskar sjúkur. Henda granskingarætlan skal vera í samsvari við granskingarætlanina, sum fer at verða gjørd fyri heilsugransking sum heild í Føroyum. Í Virkisætlanini eru dømi um granskingarverkætlanir innan diabetes og endokrinologiskar sjúkur annars.

Samstarvið um gransking fer at styrkja heilsugransking sum heild í Føroyum, og ikki bert gransking innan diabetes og aðrar endokrinologiskar sjúkur. Allir heilsugranskarar fara at kunnu gagnnýta teir møguleikar, sum fara at standast av, at granskingarundirstøðukervið verður ment. Somuleiðis fara allir heilsugranskarar at hava javnbjóðis atgongd til hølir til ávikavist kliniska og aðra gransking. Bygnaðarliga fer granskingin at hoyra undir komandi Heilsugranskingareindina, sum verður sett á stovn 1. januar 2023.

Ein partur av upphæddini frá Novo Nordisk Fonden verður brúktur til hølir. Talan verður um at gera ein tilbygning til C bygningin[3] á Landssjúkrahúsinum. Bygningurin skal hýsa virkseminum í Steno Miðstøðini. T.v.s., at í bygninginum verða hølir til viðgerð fyri diabetes og endokrinologiskar sjúkur annars, hølir til kliniska gransking, sum allir heilsugranskarar kunnu brúka, umframt hølir til umsiting og undirvísing. Bygningurin verður bygdur soleiðis, at tað verður lætt og ómakaleyst hjá persónum við diabetes og endokrinologiskum sjúkum annars at koma í B bygningin á Landssjúkrahúsinum og harvið koma til aðrar serlæknar, sum tey kunnu hava tørv á.

Í Virkisætlanini stendur, at landið eigur bygningin. Hóast talan er um eitt samstarv í 10 ár, t.v.s. í tíðarskeiðinum 1. januar 2023 – 31. desember 2032, skal bygningurin fyrstu 30 árini brúkast til virksemið hjá Steno Miðstøðini. Eftir hetta ger landið sjálvt av, hvat bygningurin verður brúktur til. Um samstarvið millum landsstýrið og Novo Nordisk Fonden heldur uppat, áðrenn tey 30 árini eru farin, skal bygningurin brúkast til uppruna endamálið tað sum eftir er av 30 ára tíðarskeiðinum. Um landsstýrið ynskir at brúka bygningin til annað endamál, kann landsstýrið fáa rætt til tað, men hetta er tá treytað av, at landið endurrindar ein part av peningaupphæddini, ið Novo Nordisk Fonden letur til bygningin. Virðið á bygninginum verður avskrivað linjurætt yvir 30 ár, og eitt afturgjald til Novo Nordisk Fonden verður ásett við støði í hesum.

Tá verkætlanin um tilbygningin til C bygningin er fyrireikað og prosjekterað, verður ein verklagslóg løgd fyri Løgtingið.

Sambært Virkisætlanini verður Steno Miðstøðin bygnaðarliga skipað sum ein partur av Medisinska Deplinum. Ein nevnd verður sett, sum hevur yvirskipaðu strategisku ábyrgdina av samstarvinum og skal tryggja, at upphæddin frá Novo Nordisk Fonden verður brúkt samsvarandi avtalu partanna millum. Landsstýrið og nevndin fyri Novo Nordisk Fonden góðkenna karmarnar fyri virkseminum hjá nevndini og gera av, hvussu nevndin verður mannað. Nevndin arbeiðir undir ábyrgd hjá landsstýrinum.

Í nevndini eru fimm limir: Aðalstjórin í Heilsumálaráðnum er forkvinna, Novo Nordisk Fonden velur ein lim, forstjórin í Sjúkrahúsverkinum, varastjórin í Sjúkrahúsverkinum (lækni) og stjórin í Heilsutrygd. Sætið í nevndini fylgir starvinum hjá nevndarlimunum, tó undantikið hjá umboðnum, sum Novo Nordisk Fonden velur. Aðalstjórin í Heilsumálaráðnum vísir til landsstýrismannin í heilsumálum. Nevndin er viðtøkufør, tá allir nevndarlimir møta á fundi ella hava greitt atkvøðu. Avgerðir hjá nevndini verða tiknar við vanligum meiriluta, og strembað verður eftir, at semja er um tær.

Leiðslan á Medisinska Deplinum verður leiðsla fyri Steno Miðstøðini. Uppgávurnar hjá leiðsluni eru lýstar í Virkisætlanini. Leiðslan vísir til sjúkrahúsleiðsluna á Landssjúkrahúsinum; men tá tað snýr seg um viðurskifti, sum fevna um at seta tiltøk í verk, sum eru fíggjað sum partur av upphæddini frá Novo Nordisk Fonden, vísir leiðslan til nevndina fyri Steno Miðstøðina.

Ein endokrinologur og ein sjúkrarøktarfrøðingur fara at hava klinisku fakligu ábyrgdina av virkseminum á Steno Miðstøðini.

[3] C bygningurin er tann hvíti bygningurin, sum stendur oman og niðan mótvegis J.C. Svabosgøtu.

Harumframt er ætlanin at seta nevndir, sum hava til uppgávu at stuðla undir og støðugt menna arbeiðið, sum fer fram á Steno Miðstøðini. Ein nevnd verður sett við umboðum fyri sjúklingar og avvarðandi og ein granskingarnevnd verður sett fyri diabetes- og endokrinologiska økið.

Við støði í Virkisætlanini verða gjørdar tvær avtalur, ein játtanaravtala og ein byggiavtala, sum eru løgfrøðiliga bindandi fyri tíðarskeiðið, sum samstarvið partanna millum fevnir um. Játtanaravtalan regulerar tað, sum peningaupphæddin frá Novo Nordisk Fonden skal brúkast til og treytir hesum viðvíkjandi. Byggiavtalan regulerar viðurskifti í sambandi við bygningin, sum skal hýsa virkseminum hjá Steno Miðstøðini og treytir hesum viðvíkjandi. Virkisætlanin er ikki løgfrøðiliga bindandi fyri landsstýrið og Novo Nordisk Fonden, men verður nýtt sum tulkingaríkast undir avtalunum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við lógaruppskotinum fær landsstýrismaðurin heimild til at kunna taka ímóti peningaupphæddini frá Novo Nordisk Fonden til samstarvið partanna millum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið er orðað við støði í Virkisætlanini. Arbeiðið við ávikavist Visiónsætlanini og Virkisætlanini er gjørt í samstarvi við viðkomandi partar, sum antin hava luttikið í stýrisbólkum, verkbólkum, arbeiðsbólkum ella á fundum um innihald í samstarvinum millum Novo Nordisk Fonden og landsstýrið. Viðkomandi partarnir eru: Sjúkrahúsverkið, Heilsutrygd, Diabetesfelagið, Apoteksverkið, persónar við diabetes, Fíggjarmálaráðið, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Ílegusavnið, Fólkaheilsuráðið, Fróðskaparsetur Føroya, Granskingarnevndin á Landssjúkrahúsinum, Granskingarnevndin undir Læknafelag Føroya, Sjúklingaráðið, Læknafelag Føroya, Serlæknafelag Føroya, Kommunulæknafelag Føroya og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar. Lógaruppskotið er ikki sent til hoyringar. Mett verður, at allir partar, sum verða ávirkaðir av virkseminum í Steno Miðstøðini, eru hoyrdir og hava verið við til at mynda innihaldið í samstarvinum. Harumframt er tíðin ov knøpp. Viðkomandi partarnir fara eisini at vera við til at menna virksemið í Steno Miðstøðini frameftir.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Upphæddin, sum Novo Nordisk Fonden letur Føroyum, fer til at fíggja virksemið, sum kemur afturat verandi virksemi (í Virkisætlanini verður hetta nevnt supplerende aktivitet). Landið skal framvegis fíggja tað vanliga virksemið (í Virkisætlanini verður hetta nevnt standard aktivitet). Vanliga virksemið fevnir um verandi viðgerðartilboð, rakstarútreiðslur o.s.fr.

Ein partur av upphæddini frá Novo Nordisk Fonden skal brúkast til ein bygning, sum skal hýsa virkseminum hjá Steno Miðstøðini. Fyrstu 30 árini kann bygningurin bert brúkast til hetta endamál, uttan so at samstarvið heldur uppat, sum umrøtt undir parti 1.3 Endamálið við uppskotinum. Hóast tað er Novo Nordisk Fonden, sum rindar útreiðslurnar at byggja bygningin, er tað landsstýrið, ið stendur fyri byggingini og eigur bygningin.

Ein avtala verður gjørd partanna millum um, hvørja upphædd Novo Nordisk Fonden letur til at byggja bygningin.

Arbeiðið við bygninginum verður skipað í tveimum høvuðspørtum: a) Fyrireiking og prosjektering og b) Bygging.

Til a) Fyrireiking og prosjektering
Vísir tað seg, tá farið verður undir at fyrireika og prosjektera bygningin, at hann verður dýrari enn upprunaliga roknað við, mugu Novo Nordisk Fonden og landsstýrið taka støðu til, hvørja avleiðing hetta fær fyri bygningin. Í slíkum føri mugu partarnir t.d. umrøða, um fermetratalið á bygninginum skal lækka, um onnur høli ella staðseting kunnu útvegast, ella økt játtan kann fáast, so bygningurin kann byggjast sum ætlað.

Til b) Bygging
Vísir tað seg, at bygningurin verður dýrari enn ætlað, aftaná at byggingin er byrjað, málandsstýrið taka støðu til, hvørja avleiðing hetta fær fyri byggjaríið. Novo Nordisk Fonden hevur boðað frá, at grunnurin ber ikki møguligar meirútreiðslur í sambandi við byggingina.

Landið skal fíggja rakstrarútreiðslur og viðlíkahaldsútreiðslur í bygninginum, sum skal hýsa Steno Miðstøðini Tað ber ikki til longu nú at siga, hvørjar tær øktu rakstararútreiðslurnar og viðlíkahaldsútreiðslurnar hjá landinum fara at verða.

Upphæddin frá Novo Nordisk Fonden verður brúkt sambært Virkisætlanini og avtalum partanna millum. Upphæddin verður ásett á Løgtingsins fíggjarlóg. Játtanarliga fer ein mett upphædd býtt á fíggjarár at standa í fíggjarlóg árini 2023-2032 við eins stórum inntøkum og útreiðslum. Talan er soleiðis um útreiðsluneutralitet í fíggjarlógini.

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Virksemið, sum fer at standast av samstarvinum millum landsstýrið og Novo Nordisk Fonden, fer at hava við sær umsitingarligar avleiðingar. Orsøkin er, at nógv nýtt virksemi verður sett í verk, og tí verður tørvur á at seta starvsfólk afturat í starv til nýggju uppgávurnar. Starvsfólkini verða sett í starv í Sjúkrahúsverkinum. Ein partur av peningaupphæddini frá Novo Nordisk Fonden fer til starvsfólkaútreiðslur hjá hesum starvsfólkum.

Økta virksemið fer somuleiðis at hava við sær aðrar umsitingarligar avleiðingar fyri Heilsumálaráðið, Sjúkrahúsverkið og Heilsutrygd. Áðrenn samstarvið partanna millum er byrjað, er torført at siga hvørjar umsitingarligar avleiðingar fara at standast av samstarvinum, og hvørt hetta fer at økja um útreiðslurnar hjá teimum.

Greitt er tó, at tær umsitingarligu avleiðingarnar verða ymiskar fyri ávikavist Heilsumálaráðið, Sjúkrahúsverkið og Heilsutrygd. Sambært Virkisætlanini verða tær umsitingarligu avleiðingarnar fyri Heilsumálaráðið ikki so umfatandi, og tískil verður roknað við, at tær kunnu rúmast innan verandi játtan. Heilsutrygd fer at fáa nakað av øktari umsiting av samstarvinum, eftirsum samstarvið eisini fevnir um skipanir, sum Heilsutrygd umsitur, t.d. kommunulæknaskipanina, skipanina við kostfrøðingum og heilsufrøðingar. Steno Miðstøðin verður staðsett í Sjúkrahúsverkinum, og fer hetta at hava við sær økta umsiting hjá Sjúkrahúsverkinum, umframt tey, sum verða sett í starv í Steno Miðstøðini. Vónað verður, at møguligar meirútreiðslur hjá Heilsutrygd og Sjúkrahúsverkinum kunnu rúmast innan verandi játtan.

Lógaruppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Av tí, at ein bygningur fer at verða bygdur sambært avtaluni, fer hetta at hava jaligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Samstarvið millum millum landsstýrið og Novo Nordisk Fonden fer at hava jaligar avleiðingar fyri persónar við diabetes og endokrinologiskum sjúkum annars. Sambært samstarvinum verður gransking og granskingarundirstøðukervið styrkt, og fer hetta at hava við sær jaligar avleiðingar fyri heilsugransking sum heild í Føroyum.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri nakran millumtjóðasáttmála.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi sáttmálar.

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við Løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2006 um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan, Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS**

Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneske-rettighedskonvention.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
Í samstarvinum millum landsstýrið og Novo Nordisk Fonden verða atlit tikin til atkomu og atgeingi fyri øll. Samstarvið hevur jaligar avleiðingar fyri persónar við diabetes og endokrinologiskum sjúkum annars, umframt fyri heilsugransking sum heild í Føroyum.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar, og ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til onnur, men heimilar landsstýrismanninum at taka ímóti eini peningaupphædd í sambandi við samstarvið millum landsstýrið og Novo Nordisk Fonden.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um atgongd hjá almennum myndugleikum til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Ja	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Ja	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Ásetingin gevur landsstýrismanninum heimild til at taka ímóti 121 mió. kr. frá Novo Nordisk Fonden. Upphæddin verður brúkt til at fíggja samstarvið partanna millum komandi 10 árini, t.v.s. frá 1. januar 2023 – 31. desember 2032, soleiðis sum tað er orðað í Virkisætlanini fyri samstarvið nevnd "En styrket diabetes og anden endokrinologisk indsats på Færøerne. Etablering af Steno Diabetes Center Færøerne – Steno Miðstøð".

Ætlað upphædd býtt á fíggjarár fer at standa í fíggjarlógini komandi árini við eins stórum inntøkum og útreiðslum, soleiðis at talan er um útreiðsluneutralitet fyri fíggjarlógina.

Sambært Virkisætlanini verður bygdur ein bygningur. Landið stendur fyri byggingini og eigur bygningin. Samstarvið millum landsstýrið og Novo Nordisk Fonden er galdandi í 10 ár, og fyrstu 30 árini skal bygningurin brúkast til virksemið hjá Steno Miðstøðini. Eftir hetta ger landið sjálvt av, hvat bygningurin verður brúktur til. Um samstarvið millum landsstýrið og Novo Nordisk Fonden endar, áðrenn tey 30 árini eru farin, skal bygningurin brúkast til ætlaða endamálið tað, sum eftir er av teimum 30 árunum. Um landsstýrið ynskir at brúka bygningin til annað endamál, kann landsstýrið fáa rætt til tað, men hetta er tá treytað av, at landið endurrindar ein part av peningaupphæddini, ið Novo Nordisk Fonden letur til bygningin. Virðið á bygninginum verður avskrivað linjurætt yvir 30 ár, og eitt afturgjald til Novo Nordisk Fonden verður ásett við støði í hesum.

Ein verklagslóg fer at verða gjørd viðvíkjandi bygninginum. Av tí, at Novo Nordisk Fonden longu hevur latið 2 mió. kr., er samlaða peningaupphæddin frá Novo Nordisk Fonden 123 mió. kr.

Til § 2
Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Heilsumálaráðið, 2. august 2022.

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

/ Turid Arge

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1:
Virkisætlan: En styrket diabetes og anden endokrinologisk indsats på Færøerne Etablering af Steno Diabetes Center Færøerne – Steno Miðstøðin.